HOYVÍKSHØLLIN

Kappingarárið 2020-2021

# H71

## HEIMA Í HOYVÍK

FALDARI 1 | SUNNUDAGIN 27. SEPT. 2020



SMS-KAPPINGIN KVINNUR **H71-VÍF** KL. 14.00

BURN-KAPPINGIN MENN **H71-VÍF** KL. 16.00

adidas

Auto Service

BÓNUS -er biligari!

J&K

BYGMA BALSLEV

INTERSPORT Thomas Dam ítróttur

ADVOKATFELAGIÐ

LAIDERZ

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# KAPPINGARÁRIÐ BYRJAÐ

Eftir helst drúgvasta steðg í nýggjari føroyskari hondbóltsøgu, rullar hondbólturin loksins aftur, og er tað av sonnum ein frøi at kunna taka táttin uppaftur og bera trúgvu hondbóltsfjepparum okkara leikskránna upp í hendurnar aftur.

Ikki er tað nøkur loyna, at tá ið kappingin varð niðurløgd í vár, lógu bæði fremsta mans- og kvinnuliðið hjá H71 sera væl fyri í landskappingini. Neyvan er stórur ivi um, at felagið í minsta lagi hevði fingið eitt lið við í finalurnar í landskappingini. Avgerðin at enda kappingini 2019/20 í ótíð kom tí H71 og hondbóltsfanatiskum hoyvíkingum sera illa við, bæði ítróttarliga og fíggjarliga. Ein uggi er tó, at steypakappingarnar vóru lidnar, áðrenn korona sóttin steðgaði hondbóltinum, og har eydnaðist okkum at vinna hjá bæði kvinnum og monnum, so vit eiga einastu meistaraliðini hjá teimum vaksnu farna kappingarár.

## Nýggjar venjarar

Bæði hjá kvinnum og monnum eru broytingar hendar undan hesum kappingarárinum, tí bæði lið hava fingið nýggjan høvuðsvenjara og eisini hava útskiftingar verið í hópunum.

Á odda fyri fremsta mansliðnum stendur nú danski høvuðsvenjarin, Simon Olsen, og hevur hann sær til hjálpar altíð trúgvu hjálparvenjararnar, Halgir Dahl Olesen og Petur Mittún. Eisini halda fysiski venjarin og málmansvenjarin, ávikavist Heri Ziska og Dejan Lacok, fram hjá bæði kvinnum og monnum.

Spælarar sum Rúni Vest Højgaard, Pætur Mikkjalsson, Elias Ellefsen á Skipagøtu, Pauli

hallo·fo
nethandilin við góða úrvalinum, góðu prísunum og góðu tænastuni
www.hallo.fo - hallo@hallo.fo

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Hilmar Jan Hansen
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent


BANKNORDIK
Ungdómsbankin
Njót løtuna
Lat okkum hugsa um teg
Meira enn ein banki
banknordik.fo/ungdomsbankin

Mittún, Hørdur Trygvason, Janus Dam Djurhuus, Leivur Mortensen og Vilhelm Poulsen eru farnir uttanlands at spæla, og Hilmar Leon Jacobsen er givin. Inn á liðið er komið "nýtt og gott gamalt", so sum Hallur Biskupstø, Bogi Gaard Davidsen og Rói Ellefsen á Skipagøtu, umframt nýggi danski málverjin, Jackob Nitholl Thomsen.

Hóast stóru frágongdina, so tykist avgjørt stirðil vera í liðnum framvegis. Liðið hevur spælt ein dyst í kappingini higartil í ár, sum gjørdist ein sannførandi 34-17 sigur á StÍF inni á Skála.

## Góða byrjan

Hjá kvinnunum er eisini komin nýggjur danskur høvuðsvenjari, Carsten Thomsen, sum saman við sær hevur tann altíð savnandi og stuðlandi hjálparvenjaran, Hall Danielsen.

Frágongdin hjá kvinnunum er, at landsliðsmálverji okkara, Annika Fríðheim, Petersen er farin til Íslands at royna seg, og bæði Durita Toftum Joensen og Karin Holm Simonsen, sum hava spælt á ávikavist strikuni og vonginum, eru farnar uttanlands í lestrarørindum.

Nýggjar á liðnum eru millum annað týski málverjin, Mia Julius, og so Jana Mittún og Elsa Egholm, ið báðar eru komnar heimaftur frá eftirskúla í Danmark. At kvinnuhópurin í ár er krútsterkur, er lítið at ivast í. Tær hava eisini fingið eina góða byrjan upp á kappingarárið við sigrum í báðum teimum fyrstu dystunum – fyrst vunnu tær 37-19 á StÍF og síðani 29-19 á Stjørnuni, ið báðir vóru útidystir.

Bæði liðini skulu um vikuskiftið møta VÍF og eru hetta fyrstu heimadystir okkara í ár. Serliga manssliðið hjá VÍF er væl fyri í ár, so eingin ivi er um, at menninir fáa skarpan gang. Gamaní, vit bastu VÍF við einum máli í stórsteypadystinum, men tann dysturin kundi so avgjørt vera farin báðar vegir.

FISHFACTS

*Eitt klikk frá svarinum*

WWW.FISHFACTS.COM





# Skalt tú keypa hús ella íbúð?

Tosa við okkum um fígging

ns.fo

*Norðoya Sparikassi   Hoyvíksvegur 67   FO-100 Tórshavn   Tel. 47 5000   Fax 47 6015   ns@ns.fo*


www.torshavn.fo
Skapandi, mennandi, kveikjandi
TÓRSHAVNAR
KOMMUNA


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

# EGINSTUÐLAR

FAROE SHIP

LAIDERZ

LBF

Dveylan reingerð

Fiskastykkið

STRANDA MÁLING

magn

SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

H71

# H71

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SPEKT | løggildir grannskoðarar

PRISMA

Heini Weihe
DESIGN & CONSULT

VØRUHÚSIÐ

ADVOKATSKRIVSTOVAN

SALMON PROTEINS

ADVOKATFELAGIÐ




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN
EYÐIN DJURHUUS · JULIANNA KLETT

# VOLVO XC40



*Bilurin á myndini verður vístur við eyka útgerð





**PRÍSUR ÚR**

# 398.000,-

**+ LEVERINGSKOSTNAÐ**

**LEITAR TÚ EFTIR DREYMABILINUM?**

Hevur tú altíð droymt um ein bil, sum ikki er ov stórur, men alíkavæl rúmar nógv og har snið, tøkni, hentleikar og trygd ganga upp í eina hægri eind? – Ja, so er hetta dreymabilurin. Ger dreymin til veruleika! Kom og royn hann hjá P/F Wenzel, Volvo umboð í Føroyum.

Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00

**WENZEL.FO**








DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO

# VÆLKOMIN

Hóast tað viðhvørt kann kennast sum ein lætti, tá ið hondbóltskappingin er av hjá okkum, sum varða av H71, so var kenslan í ár øðrvísi.

Eins og annað í samfelagnum, so steðgaði hondbólturin brádliga á grækarismessu. Okkara kvinnur lógu væl fyri í kappingini og vit byrjaðu so smátt at trúgva uppá, at vit á fyrsta sinni skuldi uppliva at spæla um gull í bestu kvinnnudeildini. Okkara menn lógu – sum vanligt ;) – fremst og høvdu beina kós móti fjórða føroyameistaraheitinum á rað. Men sum øllum kunnugt, so vildi korona tað øðrvísi og eingin føroyameistari varð kosin í 2020 í bestu deildunum.

Vit kundu tó ugga okkum við, at vit vunnu steypagull hjá bæði kvinnum og monnum, men kenslan av nøkrum óforloystum var stór. Tískil er tað við spenningi, at vit aftur bjóða til hondbólt í Hoyvík. Málini, vit settu okkum í fjør, eru endurmett og liðini broytt. Nýggir spælarar koma at gera seg galdandi í ár og nýggir høvuðsvenjarar skulu royna seg hjá bæði kvinnum og monnum.

Hugaligt er at kenna, hvussu glað børnini eru um aftur at sleppa at spæla hondbólt. Ofta er tað so, at tað er ikki, fyrr enn tú ikki sleppur í høllina, at tú veruliga skilur týdningin av at hava eitt mennandi frítíðarítriv.

Nú kunnu vit so bjóða vælkomin í høllina sunnudagin. Vit gleða okkum at síggja tykkum og hava saknað hondbóltsfamiljuna í Hoyvík.



**Anna Dam**
forkvinna H71

**GG! Aðalfundur í H71 er fríggjadagin tann 25. september klokkan 17.00 í kantinuni. Øll eru vælkomin.**


FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Ger tínar dreymar til veruleika
- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.
Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.
Gjaldskort
Netbanki
Fígging
FramtíðarKonta
Vitja okkum í Vági og Havn.
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI
ANNIJANNI



Mansliðið hjá H71, sum vann á VÍF í stórsteypadystinum og tryggjaði okkum fyrsta steypið hetta kappingarárið – og Lionsbikarið sleppur at standa í Hoyvík fimta árið á rað!
*Mynd: Hondbóltssamband Føroya*

# MENNINIR VUNNU FIMTA LIONS-BIKARIÐ Á RAÐ

Undanfarna kappingarár endaði onkursvegna í ongamannalandi, tá ið korona gjørdi tað neyðugt hjá Hondbóltssambandinum at avblása kappingarnar hjá teimum vaksnu, uttan at nakar meistari varð funnin.

Men fyri tað kundi hetta kappingarárið byrja, sum tað plagar, tí Hondbóltssambandið og Lions Club skipaðu fyri stórsteypadystum um Lionsbikørini, sum vanligt hevur verið. Hesaferð fór allur ágóðin til átakið hjá Bláa Krossi, tey rópa "Øll hava rætt til góð barnaár".

Menninir, ið vunnu steypakappingina og vóru fremstir, tá ið landskappingin steðgaði, spældu ímóti VÍF, sum var næstfremsta liðið. Dysturin var sera spennandi, men H71 vann við einum máli, 23-22, eftir at hava verið á odda 10-9 í hálvleikinum, so at Lionsbikarið kom niðan til Hoyvíkar.

Hetta var ikki so lítið bragd, tí tey sjey árini, skipað hevur verið fyri stórsteypadystunum hjá monnum, hava H71-menninir nú vunnið síðstu fimm árini á rað!

Undan mansdystinum spældu kvinnurnar ein uppaftur meira spennandi dyst, har H71 sum steypavinnari tók ímóti Kyndli, sum var oddalið í landskappingini, tá ið hon endaði. Her endaði vanligi dysturin við javnleiki 24-24, eftir at Kyndil var á odda 14-11, men í umdystinum megnaðu tær grønu at vinna 4-2 og samanlagt 28-26, so Kyndil streyk avstað við Lionsbikarinum hjá kvinnum.

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**




Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN

# 3 hálvleikur
# í Angus



**Bílegg borð á tel. 717777**

Vit svara millum kl. 11.00 og 22.00

## Vit stuðla kvinnuliðnum hjá H71



ANGUS
STEAKHOUSE



Mynd: Gudmund Helmsdal



www.laiderz.dk



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

*Alt til* *HITA*
*SANITET &*
*VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HF

HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

# REINAR TENN BRENNA IKKI



J&K

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25






## Visti tú at...

Vit ala á harðbalnum økjum fyri ikki at dálka umhvørvið.

Vit skapa og menna heimsins mest burðardyggu mannagongdir at ala laks.

HiddenFjord laksur svimur úr sjónum til góðskingarvirkið fyri ikki at gerast strongdur.



HiddenFjord laksur livir í einum av heimsins reinastu høvum við røttum sjóvarhita. Hetta er natúrliga umhvørvið hjá villa atlantiska laksinum.

Vit leggja stóran dent á at ala ein natúrligan laks uttan antibiotika og hormonir.

HiddenFjord laksur smakkar sera væl og er stak heilsugóður.

# SIMON OG FAMILJAN STÓRTRÍVAST

Hóast sín unga aldur, hevur 26 ára gamli Simon Olsen starvast sum venjari bæði hjá SIK í Viborg, Skive fH, EH Aalborg og úrvalsliðum hjá jútska hondbóltssambandinum, so hann er ikki nakar óroyndur harri, nú hann hevur leitað sær til Hoyvíkar at vera høvuðsvenjari hjá mansliði okkara, umframt at venja børn og ung.

– Tað byrjaði við, at eg saman við familjuni leitaði eftir nýggjum møguleikum, og tá ið so H71 stakk seg upp, sóu vit tað sum ein spennandi møguleika, sigur Simon Olsen, ið sigur familjuna uppliva tað sum ein stóran møguleika at royna seg á einum so vøkrum staði sum Føroyum.

– Familjan telur unnustuna Sanne og meg, og so hava vit dreingirnar Malthe og Theo, sum eru 10 og 8 ára gamlir, og Vilde, sum er hálvtannað ára gomul. Vit eru øll fallin sera væl til og trívast, so hetta hevur verið ein frálík byrjan fyri familjuna.

Ítróttarliga sigur nýggi venjarin seg hava fingið eina góða fatan av felagnum og mansliðnum, sum hann arbeiðir við, hóast byrjanin kanska ikki bleiv akkurát, sum hann hevði hugsað sær.

– Vit vóru nóg illa komnir í høllina, so blivu vit sendir heimaftur orsakað av koronu, so tí máttu vit finna upp á okkurt annað. Tað gjørdist ymisk venjing uttandura, tí har kundu vit framvegis hava fokus á at fáa ein góðan grundform, áðrenn vit sluppu innaftur at venja. Tað hevur riggað væl, heldur hann.

### Øll ringan uppstart

Simon Olsen er uppvaksin í somu kommunu sum Peter Krogh, so teir kendust, og tað hevur eisini verið ein orsøk til, at Simon ikki stóð púrasta á berum, tá ið tað snúði seg um føroyskan hondbólt, nú hann sjálvur fekk møguleikan at royna seg her.

– Eg teljist annars millum teirra, ið fylgja við hondbólti vítt og breitt, og tí hevði eg fylgt eitt sindur við, hvussu tað gekk hjá Peter, umframt at eg vist um A-landsliðið hjá tykkum, sum hevur fingið alsamt betri úrslit tey seinnu árini, og so visti eg eitt sindur um føroysku ungdómslandsliðini, sigur hann.

– Nú eg eri komin upp á pláss, haldi eg, at tað heila livir upp til tað, eg hevði væntað. Vit hava bara verið her í góðar tveir mánaðir, men eg haldi meg síggja, at tá ið tey betru liðini møtast og spíla seg út, spyrjast góðir dystir burturúr. Men so havi eg eisini sæð onkrar dystir, har tað hevur verið minni gott, so tað kundi sæð út til, at eitt glopp er millum toppin og botnin, sigur Simon Olsen.

H71-venjarin undirstrikar, at tað sjálvandi eisini telur við, at tað hevur verið ein ringur uppstartur hjá øllum, so enn er ov tíðliga at siga akkurát, hvussu tað kann fara at spæla av, men hann ímyndar sær, at tað kanska serliga vera eini trý ella fýra lið, ið koma at kappast heilt frammi í oddanum.

– Eg havi spennandi tilfar at arbeiða við og síggi stórt potentiali í hópinum, og sjálvt um H71 hevur verið roknað sum stórfavorittur seinnu árini, vænti



– Eg havi spennandi tilfar at arbeiða við og síggi stórt potentiali í hópinum, sigur nýggi venjarin hjá H71-monnunum, Simon Olsen, ið saman við familjuni er fallin væl til í Føroyum
*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

eg ikki, at tað verður upp á sama máta í vetur, tí eg síggi fyri mær, at fleiri verða um boðið, sigur hann.

– Millum liðini, vit koma at kappast við, er óivað eisini mótstøðuliðið hesaferð, VÍF, sum er samanspælt í nøkur ár, uttan at tær heilt stóru inn- og útskiftingarnar hava verið. Skulu vit hava stig, mugu vit raka ta bestu útgávuna av okkum sjálvum, soleiðis sum vit gjørdu tað í dystinum um Lionsbikarið, har vit vunnu við bara einum máli. Tað krevur nakað av okkum.

## Evnaríkir spælarar

Longu nú heldur Simon Olsen seg síggja, at her eru fleiri øgiliga góðir spælarar, bæði millum teir ungu og teir vaksnu, og at fleiri av teimum hava góðar møguleikar at menna seg. Og eisini heldur hann tilfeingið vera so mikið gott, at boð kunnu vera eftir fleiri spælarum frá feløgum uttan fyri Føroyar.

– Vit síggja longu nú, at fleiri føroyingar standa seg væl í Danmark, Svøríki, Norra og Íslandi, men eg havi varhugan av, at enn fleiri fara at koma langt. Har hugsi eg eisini um "einarar", ið saktans kunnu klára at gera seg galdandi, sigur hann og leggur aftrat, at tað ræður um at duga at dyrka "einararnar", ið kunnu geva tað eyka, sum ger tað ordiliga gott.

– Fáa vit hesar góðu spælararnar at passa inn á liðið, fæst tað besta burtur úr øllum.


SKORA
VIÐ
SISU
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Fríggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT





ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
**www.bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**

# Bussar til øll endamál

Í Føroyum og uttanlands







Loysnir 214452

M B

**MOURITSEN´S BUSSAR**

Tel 32 21 21 · mb@mb.fo


Ring 31 45 55
SKELTI
PRENT
PAPPÍR
Sjálvandi
Føroyaprent
LANDSINS STØRSTA PRENTSMIÐJA
Føroyaprent


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:

**Gullpakkin við keypi av nýggjum bili**

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

**Auto Service**
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP


Keyp vetrardekkini
hjá okkum.
Helst bestu prísir í landinum ...
WAAG
Tel. 613666
VREDESTEIN


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
samskip





# VÆLEYDNAÐUR
# U8-DAGUR

Seinnapartin síðsta leygardag skipaði H71 fyri árliga U8-degnum. Dagurin var í Hoyvíkshøllini og vit skulu heilsa og siga, at børnini hugnaðu sær óført.

U8-dagurin vendi sær serliga til børn úr 1. og 2. flokki, og á skránni var hugni, prát við venjarar og so sjálvandi hondbóltur.

Endamálið við degnum er at geva børnunum í U8-aldri møguleika fyri at kunna seg við hondbólt og tann vegin kanska finna útav, at hondbóltur er júst nakað fyri tey.

Havandi góðu undirtøkuna í huga og góða huglagið í høllini seinnapartin leygardagin, kundi tað meiri enn so hent seg, at okkurt komandi hondbóltsnavn fekk sína fyrstu løtu av mongum við hondbóltinum og góðum hondbóltsvinum.

Sum vant eftir árliga U8-dagin, er vanliga venjingin hjá U8-børnunum byrjað hesa vikuna.



## H71

1 FÍA **W. POULSEN**
12 MIA **JULIUS**

3 JANA **MITTÚN**
4 BRYNHILD **PÁLSDÓTTIR**
6 BJØRG **BRIMNES**
7 MARIA **HALSDÓTTIR WEYHE**
8 KARINA **EYSTURTÚN RUBEKSEN**
9 MARITA **MORTENSEN**
10 EVA BARBA **ARGE**
13 INGA MARIA **JOENSEN**
14 SUNNIVA **BOGADÓTTIR**
15 ELSA **EGHOLM**
17 LÍV **BENTSDÓTTIR ZACHARIASSEN**
18 ELISABETH **HOLM SIMONSEN**
20 CHRISTINA **TURIÐARDÓTTIR ARGE**
31 SÁRA **JACOBSEN**
40 BIRITA POULINA **MORTANSDÓTTIR**

**VENJARI:** CARSTEN THOMSEN
**HJÁLPARVENJARI:** HALLUR DANIELSEN
**MÁLMANSVENJARI:** DEJAN LACOK
**FYSISKUR VENJARI:** HERI ZISKA
**LIÐLEIÐARI:** ANDRAS MARR POULSEN

## VÍF

1 VIVIANN **PETERSEN**
12 REBEKKA **JOENSEN**

2 LÍV **INGDORSDÓTTIR**
3 LILJAN **MÜLLER**
4 AGNAS **OLSEN**
5 BYNJA **RÓGVADÓTTIR**
6 TINNA **JOHNSDÓTTIR**
7 IVANA **MEINCKE**
8 INGIBJØRG **OLSEN**
9 FRÍÐA **NOLSØE OLSEN**
11 HELENA **Í SKÁLUM**
13 SVANNA **KJÆRBÆK**
17 KATHE **FREDERIKSEN**
18 JÓRUN **GUDMUNDSEN**
19 RANNVÁ **OLSEN**

**VENJARI:** JÓHAN HOFGAARD
**HJÁLPARVENJARI:** JOHN LARSEN



### SMS-kappingin

| Nr. Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. Kyndil | 3 | 86 | 54 | 32 | 6 |
| **2. H71** | **2** | **66** | **48** | **18** | **4** |
| 3. Neistin | 2 | 56 | 39 | 17 | 4 |
| 4. VÍF | 2 | 47 | 54 | -7 | 2 |
| 5. VB | 2 | 35 | 53 | -18 | 0 |
| 6. StÍF | 3 | 79 | 97 | -18 | 0 |
| 7. Stjørnan | 2 | 37 | 61 | -24 | 0 |

FM-endaspæl

## H71

1 ÁRI **DAM**
12 JÁKUP **N. THOMSEN**

2 SVEINUR **OLAFSSON**
3 HALLUR **BISKOPSTØ**
4 PETER **KROGH**
5 BOGI **DAVIDSEN**
8 PÆTUR **THOMSEN**
10 DJÓNI **GAARD JOENSEN**
11 HANS KÁRI **HANSEN**
14 SIGMUNDUR **DAHL**
18 SAKIR **TRÓNDARSON FRÝDAL**
19 BALDUR **GILLASON**
24 NIKLAS **HØJGAARD HANUSARSON**
28 RÓI **ELLEFSEN Á SKIPAGØTU**
71 BOGI **HANSEN**

**VENJARI:** SIMON OLSEN
**HJÁLPARVENJARI:** PETUR MITTÚN
**HJÁLPARVENJARI:** HALGIR DAHL OLESEN
**MÁLMANSVENJARI:** DEJAN LACOK
**FYSISKUR VENJARI:** HERI ZISKA
**LIÐLEIÐARI:** ARI JÓGVANSSON

## VÍF

1 SASHA **LACOK**
16 MLADEN **MJERIMACKA**

2 HALLUR **ARASON**
3 SJÚRÐUR **OLSEN**
4 HEINI **Á HEYGUM**
6 MAGNUS **MÜLLER**
7 JÓHAN **Í GARÐASTOVU**
8 JULIAN **OLSEN**
9 JÁKUP ANDREAS **JOENSEN**
10 ANDRIAS **ERIKSEN**
11 JOHAN KÁRI **VANG**
15 NIELS JÁKUP **EGHOLM**
18 DÁNJAL **RAGNARSSON**
19 MARTIN **NIELSEN**
20 HANUS **CHRISTOPHERSEN**
21 FILIP **JOJIC**

**VENJARI:** JOHN LARSEN
**HJÁLPARVENARI:** AGNAR JOENSEN




### Burn-kappingin

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Neistin | 2 | 65 | 53 | 12 | 4 |
| 2. | VÍF | 2 | 56 | 44 | 12 | 4 |
| **3.** | **H71** | **1** | **34** | **17** | **17** | **2** |
| 4. | Team Klaksvík | 2 | 45 | 41 | 4 | 2 |
| 5. | KÍF | 3 | 70 | 69 | 1 | 2 |
| 6. | Kyndil | 3 | 62 | 78 | -16 | 2 |
| 7. | StÍF | 3 | 69 | 99 | -30 | 0 |

FM-endaspæl (1.–4.)

betri

NÚ 1,75%

# Vit **lækka rentuna** á orkuláninum

## Skalt tú bjálva, umbyggja ella skifta vindeygu?



**Fyrimunir við orkuláni og grønari orkuloysn:**

- ✓ Minka um tína orkurokning
- ✓ Økja um virðið á húsunum
- ✓ Minka um $CO_2$-útlátið

**Ring 348 000**
og fá eitt prát um orkulán

betri.fo/**orkulan**